


# Økisleiðari til deildir okkara í Grønlandi

BANKNORDIK

**BankNordik sóknast eftir einum økisleiðara, sum vil standa á odda fyri menningini av deildum bankans í Grønlandi.**

**Í februar 2010 keypti BankNordik tríggjar bankadeildir í Grønlandi, t.e. í Nuuk, Sisimiut og Ilulissat, har 30 dugnalig starvsfólk veita okkara privat- og vinnukundum eina holla tænastu.**

### Ábyrgdarøki

Sum økisleiðari fyri deildum bankans í Grønlandi hevur tú ábyrgdina av dagliga rakstrinum á deildunum. Økisleiðarin hevur tilvísing til Súna Schwartz Jacobsen, stjóra, og hevur í stóran mun møguleika til sjálvstøðugt at merkja menningina av bankanum í økinum.

### Yrkisførleikar

Vit ímynda okkum, at tú hevur eina breiða fakliga, fíggjarliga útbúgving ella aðra viðkomandi hægri útbúgving. Tað er ein fyrimunur, um tú hevur leiðsluroyndir frá tilsvarandi starvi.

Vit vænta, at tú hevur evnini at virka í einum altjóða umhvørvi, megnar at loysa avbjóðingar og skapa motivatión millum starvsfólk.

### Persónligir førleikar

Tú megnar at arbeiða sjálvstøðugt og taka avgerðir. Tú hevur hug at arbeiða saman við øðrum og fremja gott samstarv. Sum persónur ert tú jaligur og fyrikomandi og megnar at skapa álit millum starvsfólk og kundar.

Sum økisleiðari er neyðugt, at tú áhaldandi hevur innlit í strategiska tørvin, og at tú í hesum sambandi hevur dirvi og orku at ganga á odda, tá broytingar skulu fremjast í verki.

### Vit bjóða

Eitt spennandi og avbjóðandi starv í einum altjóða umhvørvi, har virkismentanin er grundað á okkara kjarnuvirðir: dugnasemi, eldhuga og framsøkni. Starvið gevur tær møguleika fyri fakligari og persónligari menning, samstundis sum tú í tíni frítíð kanst uppliva fantastisku náttúruna. Løn og setanartreytir verða ásett í samsvar við royndir og førleikar.

### Umsóknir

Send tína umsókn og CV saman við viðkomandi skjølum til BankNordik, Húsagøta 3, Postboks 3048, 110 Tórshavn ella við teldupostí til starvsfolk@banknordik.fo. Umsóknarfreistin er mikudagin 1. desember.

Fleiri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Súna Schwartz Jacobsen á tlf. 330 350 eller á ssj@banknordik.fo.

### Um bankan

BankNordik er í eini spennandi menningartilgongd. Í oktober 2009 keypti bankin meirilutan í íslendska tryggingarfelagnum Vørði. Í februar 2010 keypti bankin 12 bankadeildir frá danska peningastovninum Sparbank, 9 deildir í Danmark og 3 deildir í Grønlandi. Sostatt eru yvir 450 starvsfólk í samtakinum, harav helvtin uttan fyri landoddarnar. Høvuðssæti bankans er í Tórshavn.

**www.banknordik.fo/starv**

SENDISTOVAN